LM-050/2025

Sólgerð Hjørleifsdóttir

FYLGISKJAL 10

Fra: Gunnar Skúvadal <puffin@olivant.fo>
Sendt: 7. oktober 2025 12:58
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Emne: Uppskot til nýggja miðlastuðulslóg - hoyringsskriv

Hoyringsskriv, broytingar í miðlastuðulslógini

Ætlaðu broytingarnar burtur frá verkætlanarstuðli til íverksetarastuðul eru enn eitt dømi um óstøðugar karmar, sum føroyska miðlavinnan hevur virkað undir seinastu árini.

Sum skilst ætlar landsstýrismaðurin at stuðla nýggjum miðlum, uttan at hann hevur nágreinað hetta nærri. Føroyskir miðlar eru framman undan smáir og spjaddir, miðlalandslagið er fragmenterað, verður stundum sagt.

Síðani Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya vórðu samanløgd í ein miðil hava Føroyar í veruleikanum bert havt eina kompetenta og ókomersiella redaktión. Tað er ringt fyri brúkaran, fyri føroyskar journalistar og fyri almenna public service miðilin (KVF) sum ikki fær nakað mótspæl. So um ætlanin er, at stuðulin so ella so skal kanaliserast ímóti eini konsolidering av verðandi miðlum, altso eini tilgongd so miðlarnir verða færri men størri, so kann tað vera skilagott.

Hevði ein skipan við rekrutering, t.v.s. tilgongd av nýggjum journalistum, eisini verið ein partur av ætlanunum, so hevði tað verið gott.

vh
Gunnar Skúvadal
Netavísin vp.fo